

## Rætting til kunngerð

**Broyting í serstøku byggisamtykt nr. 3 og almennu byggisamtyktini**

Av tí at feilur var í kunngeringini um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 735, sum var lýst í bløðunum 9. august 2006, verður broytingin lýst av nýggjum.

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 29. juni 2006 samtykti broytingar í serstøku byggisamtykt nr. 3 og almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at matr. nr. 735, við Traðabrekku, Tórshavn, verður broytt frá D1 fríøki til A1 sethúsaøki.

Eisini er ætlanin at broyta serstøku byggisamtykt nr. 3 samsvarandi, fyri matr. nr. 735, frá C1 øki til alment endamál til A sethúsaøki.

Tilfar um ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 21. august til og við 11. september 2006, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga áðrenn 21. november 2006.

**Tórshavnar kommuna**



## Pedagogiskur ráðgevi

Barna- og Ungdómsdeildin hjá Tórshavnar kommunu søkir eftir pedagogiskum ráðgeva at byrja 15. september 2006 ella skjótast gjørligt.

**Starvið**
Starvið er partur av nýggju ráðgevingarstovuni hjá kommununi.

Arbeiðið verður í høvuðsheitum at virka sum ráðgevi fyri børn við serligum tørvi

- Veita sernámsfrøðiliga ráðgeving til umsiting, stuðlar og starvsfólk á dagstovni
- Gera námsfrøðiligar eygleiðingar og metingar av børnum
- Vera limur í visitatiónsnevnd viðv. børnum við serligum tørvi

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv innan eitt øki, sum stendur fyri stórari broyting og menning.

Eitt nýtt starv, sum tú sjálv/ur hevur møguleika at mynda.
Eitt gott tværfakligt arbeiðsumhvørvi.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið, KAF og Føroya Pedagogfelag.

**Førleikakrøv**
Vit ynskja at seta eitt fólk, sum hevur

- námsfrøðiliga útbúgving
- servitan og drúgvar royndir innan serøki, gjarna eftirútbúgving innan sernámsfrøði og / ella ráðgeving
- hug og førleika at arbeiða ráðgevandi
- áhuga og evni at arbeiða í tværfakligum toymi
- góð samstarvsevni og evni at arbeiða sjálvstøðugt
- kunnleika til EDV á brúkarastøði

**Meira fæst at vita**
við at venda sær til Frígerð Sundskarð, Barna- og Ungdómsdeildarleiðari ella Birgit Debess, leiðara av Stuðulsfólkaskipanina, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Barna- og Ungdómsdeildini, Boks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 4. septembur 2006.
Viðmerk á umsóknina „Ráðgevingarstovan".

**Ráðgevingarstovan**
Ráðgevingarstovan er eitt nýtt tværfakligt ráðgevandi toymi undir Barna- og Ungdómsdeildini hjá Tórshavnar kommunu.

Ráðgevingarstovan skal umsita stuðulstiltøk og veita ráðgeving til umsiting, stuðlar og starvsfólk á dagstovnaøkinum, serliga í mun til børn við serligum tørvi.

Í toyminum verða í fyrsta umfari 3 pedagogar og ein sálarfrøðingur, og er ætlanin, at Ráðgevingarstovan seinni skal víðkast við øðrum fakbólkum.

Umframt starvsfólk á Ráðgevingarstovuni, starvast í løtuni ein leiðari og ein málsviðgeri á Barna- og Ungdómsdeildini, sum júst er flutt í nýggj hølir.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Damfar** *Lítandi góðkætti*

### - søkir handilslærling í sølu

Vit sóknast eftir handilslærlingi í heilsølu til søludeild okkara. Tú verður ein partur av einum toymi av sølufólkum, sum ferðast kring oyggjarnar at selja vørur okkara til handlar, kioskir v.m.

Vit vænta.:
· at tú hevur FHS ella HH prógv
· at tú hevur hug at læra at selja
· at tú hevur lætt við at koma í sambandi við onnur fólk
· at tú hevur hug og áræði til søluarbeiðið
· at tú hevur lætt við at samstarva við onnur og er fyrikomandi
· at tú hevur koyrikort

Vit bjóða:
· løn sambært sáttmálan millum S&K og FAG
· ískoytið til lønina, sum er prosent partur av søluni
· egnan sølubil
· eitt spennandi og gott arbeiðspláss í stórari menning
· at vera partur av einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Lærutíðin er 2 – 3 ár, alt eftir hvørja útbúgving tú hevur. Partur av lærutíðini er í Danmark, har tú skal á skeið 4 ferðir 2 vikur umframt endaligu próvtøkuna.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg, so send okkum umsókn við møguligum prógvum og viðmælum.

**DAMFAR HEILSØLA**
**Smyrilsvegur 5 · Postboks 154**
**110 Tórshavn**

## TIL SØLU



RaðhúsTorkilsgøta 1, Hoyvík, til sølu um hóskandi boð fæst. Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvi.
Byggiár 2001.
Húsini eru í 2 hæddum, í alt 160 m2.
Í niðaru hæddini eru gongd, kamar, baðirúm, hjúnarrúm við klædnarúmi, stova og køkur í einum og grovkøkur.
Á loftinum eru 2 stór kømur, uppihaldsrúm og baðirúm við brúsu.

**Tel. 320555 eftir kl. 16.00**

www.123hjemmeside.dk/torkilsgota1

# Fakligur skrivari

## til Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Søkt verður eftir fakligum skrivara til skrivstovu felagsins at byrja 1. september 2006, ella eftir nærri avtalu.

**Okkum tørvar ein sjúkrarøktarfrøðing, ið**
- hevur áhuga at vera við til at menna Felagið, bæði yrkisliga og fakfelagsliga
- hevur holla vitan um heilsu- og sjúkrarøkt
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til forkvinnu felagsins á tlf. 311309.

Umsókn, við avriti av prógvi og autorisatión, skulu vera felagnum í hendi 29. august 2006.

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
Lucas Debesargøta 14
Box 1285 · 110 Tórshavn
sff@sff.fo